









# EFTIRLITSMAÐUR

Søkt verður eftir eftirlitsmanni sum avloysara at byrja 2. januar 2007. Starvið er tíðaravmarkað til 1 ár.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum á økinum. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á tlf. 35 04 28. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi
**í seinasta lagi 27. november 2006.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REFROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

P/F TANGAVIRKIÐ

## Starvsfólk til okkara umsiting.

Søkt verður eftir fólki (m/k) til umsiting okkara (skrivstova og handil) at byrja skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Starvið umfatar bókhald, debitor- og kreditorrøkt, innkeyp til- og søla úr handlinum og arbeiði í tí sambandi.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta av tær, at tú er jaligur, fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini rokna vit við, at tú hevur í minsta lagi grundleggjandi teldukunnleika.

**Setanatreytir:**
Starvið er heiltíðarstarv. Løn og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Mortan Mortensen, tlf. 573065.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum v.m. verður at senda inna 20. november 2006 til:

**P/F Tangavirkið**
**900 Vágur**

*P/F Tangavirkið hevur í dag uml. 10 fólk í arbeiði, ið starvast í einari vælútgjørdari nýmótans smiðju.*

www.sosialurin.fo